tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 36 týsdagur 21. februar 1995 69. árgangur Krónur 7,00

## 38 vilja fáa stjóra-sessin á Vanlukku-tryggingini

síða 5



## 3 síður við ítrótti

Síðurnar 13, 14 & 15

***Lykketoft:***

## Føroy-ingar vilja krógva sína skyld



*Danski fíggjarmálaráðharrin, Mogens Lykketoft, heldur føroyska kravið um eina dómarakanning bert vera ein léttan máta at krógva, at føroyingar eiga sjálvir skyldina av búskaparligu støðuni. Hann ger somuleiðis greitt, at danska stjórnin kemur ikki við nøkrum nýggjum útspæli í føroyska bankamálinum* **Lesið á síðu 4**

***ÁRNI ÓLAFSSON, samráðingarleiðari:***

## Nú eiga bretar útspælið

síða 8

***JÓGVAN ADOLF JOHANNESEN, sandoyartingmaður:***

## BJARTI MOHR HUNGRAR ÁVÍS ØKI Í LANDINUM

Lesið á síðu 3

*Danski fíggjarmálaráðharrin, Mogens Lykketoft:*

# Føroyingar vilja hava okkum at bera ein part av skuldini

*Føroyska kravið um dómarakanning er ein léttur máti at krógva, at føroyingar eiga sjálvir skyldina av búskaparligu støðuni, heldur Mogens Lykketoft*

Danski fíggjarmálaráðharrin, Mogens Lykketoft, ger greitt í danska blaðnum BT í gjár at danska stjórnin kemur ikki við nøkrum nýggjum útspæli í føroyska bankamálinum.

Mogens Lyketoft sigur, at hetta er vorðið sera stórt mál í Føroyum, tí hetta er ein léttur máti at royna at krógva, at føroyingar sjálvir hava ábyrgdina av, at so illa gekst. Talan er um eitt politiskt orðaskifti. Føroyingar vilja hava danir at bera ein part av skuld teirra, sigur Mogens Lykketoft, og hann leggur afturat, at danska stjórnin kemur ikki við nýggjum útspæli í bankamálinum.

BT hevur eisini spurt danska fíggjarmálaráðharran hvat hann sigur til, at føroyingar kenna seg snýttar bæði av undanfarnu og verandi donsku stjórnum.

-Det opfatter jeg taktisk som en fornærmende udtalelse, sigur Mogens Lykketoft.

tor.-



*Føroyingar vilja hava okkum at rinda ein part av skuld teirra, sigur Mogens Lykketoft, fíggjarmálaráðharri*

Mynd: Jan


## Matarskrá

**hvørt kvøld kl. 18:00–23.00**

**Forverðar:**

*Jákupsskel í Strússevju við Salat og Tomat* — 44,00 kr

*Laksaterrina við Kongafiski og Mintsós* — 39,00 kr

*Sjógæti snerkt við Rómaosti, Hvítleyki og Kryddurtum* — 48,00 kr

**Súpan:**

*Kraftmikil Fiskasúpan við fiskabitum og urtum* — 39,00 kr

*Mulligatawny við Hósnabringu og Kokus* — 38,00 kr

**Fiskur:**

*Kryddbakað Toskaflak við Tomatkryddurtasós* — 134,00 kr

*Steiktur Upsi við Paprikakompott* — 121,00 kr

*Sjógæti í Rómasós við Fettuchine og Parmesanosti* — 138,00 kr

*Fiskasymfoni í 3 satsum* — 144,00 kr

**Kjøt:**

*Lundavongbringa við Kastanjusós og Fikuconfit* — 147,00 kr

*Pipar-Entrecote við Hvítleyksmøri og Grilltomat* — 119,00 kr

*Coulotte av Lambi við Exotiskum Karri* — 137,00 kr

*Búffur Forrestiére við Sós av Heiðasoppum* — 140,00 kr

**Ómaná:**

*Brie-ostur við Reyðvínslakaðum Sviskum* — 36,00 kr

*Sukurlátakøka við Jarðberu* — 34,00 kr

*Glaserað Smørdeiggj við Gallianokremi* — 32,00 kr

## Nólsoyarstova

*Matstova*

**Vinarliga bíleggið borð!**

Í Gongini 10 - 110 Tórshavn - Tlf. 11800 - Fax. 19005


# Triðji hvør dani vil loysa frá Føroyum

*Føroyingar eru óðir eftir pengum, og ódugnaligir leiðarar hava rátt í Føroyum, er ein niðurstøða eftir meiningakanning*

Sambært eini kanning, sum BT, saman við stovninum GfK hevur gjørt, eru føroyingar óðir eftir pengum, politisku leiðararnir í Føroyum eru ódugiligir, og Danmark hevur stórt sæð einki gagn av at vera saman við Føroyum.

Hetta er nakað av tí, BT leiðir burtur úr úrslitinum av kanningini.

45 prosent av donum eru tó fyri at varðveita ríkisfelagsskapin, men 36 prosent vilja slíta við Føroyar.

**Leiðararnir skyldina**

Danir halda, at við føroyska fólkinum er einki galið, men verri er við politisku leiðarunum verður sagt. Heili 47 prosent av teimum spurdu donunum halda, at føroyingar eru við í ríkisfelagsskapinum beint fyri fíggjarligan vinning, og hóast møguleikar eru at finna olju, halda 53 prosent av teimum spurdu, at Danmark fær lítið og einki burtur úr føroyskum ráðevnum.

tor.-

*Danska blaðið BT nýtti meginpartin av forsíðuni í gjár upp á føroyingar*





## Ársaðalfundur

Leygardagin 25. mars 1995
kl. 10.00 á Hotel Hafnia

Dagsskrá:

1. Val av fundarstjóra
2. Val av atkvøðuteljarum
3. Góðkenning av dagsskrá
4. Góðkenning av starvsskipan
5. Frágreiðing formansins
6. Framløga av rammufíggjarætlan og roknskapi, harímillum áseting av limagjaldi
7. Innkomin uppskot
8. Val av tveimum grannskoðarum
9. Ymiskt

Uppskot, sum skulu verða viðgjørd á aðalfundinum, mugu vera felagnum í hendi 1. mars 1995

**Sjúkrasystrafelag Føroya**

*Lýsið í* **sosialinum**